# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Anna Joensen 80 ár



Hósdagin 18. oktober fyllir Anna Joensen í Havn 80 ár. Anna var dóttir Dagmar og Herluf Johansen í Havn og var gift við Martin Joensen, Martin á Borg – av Borg á Argjum, sum doyði í 1972.

Anna og Martin fingu børnini Elsubu og Heina.

Um Annu kann sigast, at hon hevur altíð havt heimið opið fyri fólki, henni dámar væl at savna børn, ommu- og langommubørn til máltíð og hugna annars.

Anna hevur altíð okkurt á stokkunum – vit høvdu ynskt at havt talið á hosum, sum eru bundnar umframt alt annað.

Henni dámar eisini væl at vera uttan fyri og hampa um, tá ið veðrið er til vildar. Hon koyrir sjálv bil enn, er kanska líka bilsjúk, sum restin av familjuni, og hon klárar seg sera væl í øllum.

Góða mamma, ver-mamma, omma, veromma og langomma, vit øll vilja ynskja tær hjartaliga tillukku á 80 ára føðingardegnum og vilja takka tær fyri, alt tú ert og altíð hevur verið fyri okkum. Vit gleða okkum til hósdagin, tá opið hús verður heima á Villingardalsvegnum.

**Heini, Guðrun og Annika**
**Marian, Bogi, Guðrið og Heidi**
**Jákup, Susi og Fríði**

## Ragnhild Hansen 95 ár



Ragnhild Hansen er fødd í Miðvági 16. oktober 1912. Hon er dóttir Sunnevu og Jens Jacob Haraldsen. Sunneva var ættað úr Sørvági, men vaks upp hjá ommu og abba sínum á Ryggi, so hon og maðurin eru vaksin upp á sama garði, tí Jens Jacob var eisini av Ryggi.

Ragnhild sleit sínar barnaskógvar á Tormansbakka, har hon búði saman við mammuni og systrini Jensiu. Longu í apríl 1914 doyði Jens Jacob av tuberklum. Tá var Ragnhild bert 1½ ára gomul og 20. juli sama ár varð yngra systurin Jensia fødd. Hon varð uppkallað eftir pápa sínum.

Eina tíð búði hon hjá ommuni og abbanum á Mýruni í Sørvági. Har gekk hon eisini í skúla eina tíð. Henni dámdi sera væl og var nær knýtt at familjuni har úti.

Sum flest allar ungar gentur tá á døgum fór Ragnhild út at tæna. 16 ára gomul fór hon til Kirkjubøar at tæna hjá Gazet Pæturson og var har í 2 mánaðar. Hon passaði húsið og eina gamla konu, sum lá á loftinum við brotnari mjøðn, meðin hini fingu hoyggið til høldar

Seinni fór hon til Havnar at arbeiða á Hotel Djurhuus – har var hon í 2 ár. Á hotellinum búðu sjómansskúlanæmingar (navigatørar) og løgtingsmenn. Nógv var at gera, og tí varð arbeitt allar dagar í vikuni. Sjáldan slapp hon vestur at ferðast hesa tíðina, tí ferðasambandið var so vánaligt. Men treyðugt so, skyldmaðurin úr Sørvági Niclas Norðuri í Stovu (ella var tað Løðu-Jógvan) sat í tinginum tá, og varð hon boðin at koma í ferðalag við honum yvir land.. Tað var stórsligið. Fyrst við báti til Kollafjarðar, við bili til Kvívíkar og so yvir á Fútaklett, har bilur stóð fyri teimum og koyrdi hana til dyrnar. Tað var harralív.

Eisini tænti hon í Vestmanna eina tíð.

Hon flutti heim aftur til Miðvágs, og 31. januar 1937 giftist hon við Jens Jacob Hansen, sum hon hevði hildið saman við í fleiri ár. Hann var ættaður úr Kirkjastovuni við Kirkjar í Miðvági. Tey høvdu bygt sær hús á Tormansbø og fluttu inn hagar. Abbin, Ólavur í Kirkjastovu flutti saman við teimum.

Ragnhild og Jens Jacob fingu 2 dreingir við stuttum millumbili, tað eru Ólavur og Jens Jacob (Akku).

Lagnan varð teimum hørð. Bert góð 5 ár fingu tey saman, tí í 1942 mistu tey mann og pápa við Nýggjabergi. Somu lagnu fekk systurin – Jensia – hon misti eisini mannin Hjalmar við sama skipi. Tey høvdu tá verið gift í góð 4 ár og áttu genturnar Hannefíu og Sunnevu (Uvu).

Ragnhild og Jensia eru rættuliga nær knýttar og fyrimyndarligar systrar, og børnini, sum eru vaksin upp undir somu umstøðum, hildu nógv saman og kenna seg næstan sum systkin.

Tað var ikki nógvum, ein einsamøll kona kundi lívbjarga sær við tá á døgum, men hon var við, tá nakað fiskaarbeiði var. Abbin ansaði dreingjunum og hjálpti til við tí húsliga. Nógvar eru eisini skipstroyggjurnar í tali, sum hon hevur bundið at selja. Og ikki um at tala allar hosurnar og troyggjurnar hon hevur bundið synunum og ommubørnunum.

Ragnhild hevði so mikið av jørð, at hon kundi hava kúgv. Og so skilagóð og røkin Ragnhild altíð var, so røkti hon avgrøðina og kríatúrini, sum gjørdust gott íkast í húsarhaldinum.

Ragnhild er sera gudrøkin. So leingi, hon hevði orku, stóð stólur hennara í kirkju og missiónshúsi ikki tómur. Um vetrarnar var hon ein av teimum føstu, sum gekk á kvinnumøti og samlaðist í sjómanskvinnuringinum.

Men nú er aldurin høgur, og minni svíkur. Tey seinastu 3 árini hevur hon búð á Ellisheiminum á Sýnini. Her kemur aftur til sjóndar, hvussu nær systrarnar eru knýttar at hvørji aðrari. Ragnhild og Jensia búgva við síðuna av hvørji aðrari. Har síggjast tær javnan saman eftir gongini. Og til máltíðirnar sita tær altíð saman.

Góða Ragnhild!! Vit fara við hesum at ynskja tær hjartaliga tillukku við 95 ára føðingardegnum, og má Harrin signa lívskvøldið.

Heilsan

**Svigardøturnar**

# †

## Andlát og jarðarferðir

**Hanna Jensen**, fødd Eliasen úr Fuglafirði, búsitandi í Holsterbro andaðist sunnudagin, 74 ára gomul.

## Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara elskaði sonur og beiggi

**Jan Karl Vidtfeldt**
Miðvágur

doyði og varð jarðaður.
Takk til prest og kirkjutænarar. Tøkk til tykkum, ið hjálptu til við jarðarferðini og ervinum.
Eisini ein tøkk til starvsfólkið á føðideildini fyri góða umsorgan.
Tøkk til Bjarna Bæk fyri góð og troystarrík orð.

*Familjunnar vegna*
**Kristoffur, Marin Elisabeth og Edit Simona**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu tá okkara kæri unnusti, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Hjalmar Joensen**

doyði og varð jarðaður.

Ein serstøk heilsan til starvsfólkið á G4.
Takk fyri heilsanir, uppringinar og peningagávu til Fuglafjarðar kirkju.
Takk øll, sum hjálptu til við jarðarferðina og takk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Judith, Herman, Ovi, Annika og Sigbjørg v/ fam.**